
Formaðurin í diskotekklubbanum:

Skulu onga løn hava fyri arbeiðið

Ætlá at lata pening til ungdómsendamál

Tamm fimmfólkanevndin, sum nú er vald, hevur samtykt, at vit skulu ikki hava samsýning fyri nevndararbeiðið. Vísur tað seg, at tað verður yvirskot í kassanum hjá diskotekklubbanum, fara vit at umhugsa at lata pening til ymisk ungdómsendamál í býnum

Soleiðis sigur nývaldi formaðurin í diskotekklubbanum í Havn, Lars Jespersen. Hann sigur, at nevndin hevur sent umsókn til Havnar Klubba um at hava ein fund, har framtíðar umstøðurnar hjá diskotekklubbanum koma til viðgerðar. Tann 1. januar í ár segði Havnar Klubbi upp sáttmálan við báðar nevndarlimirnar í diskotekklubbanum um leigu av hølum klubbans til dans. Orsøkin var tann, at Klubbin ætlar at fara undir útbygging.



Lars Jespersen, formaðurin

—Vit rokna við at fáa loyvi at vera verandi í Klubbanum, sigur Lars Jespersen. Havnar Klubbi hevur neyvan ráð hvørki økonomiskt ella, moralskt at blaka okkum ut.

Annars hevur diskotekklubburin fingið játtan frá Sjónleikarahúsinum at lána høli til dans, um tað verður neyðugt. —Vit ætla okkum eisini at søkja um dansiloyvi fyri diskotekklubban, sigur Lars Jespersen.

Kanna peningaviðurskiftini

Eitt tað fyrsta, sum nýggja nevndin fer undir, er at kanna peningaviðurskiftini hjá diskotekklubbanum. Á eykaaðalfundinum varð álagt nevndini at kanna hesi viðurskifti. Lars Jespersen sigur, at teir vónandi innan ein mánaða kunnu hava nakað at leggja fram á einum nýggjum eykaaðalfundi. Og hann heldur fram:

—Vit hava varðhugavn av, at alt ruggar ikki rætt í peningaviðurskiftum felagsins. Vit hava fingið ein sakførara, tað er Jógvan Páll Lassen, at taka sær av hesum máli. Orsøkin til at vit fara at kanna hesi viðurskifti kemst fyrst og fremst av viðmerkingini hjá Paula Ellefsen, grannskoðara, til roknskapin fyri 1975. Har sigur hann m.a., at reglur klubbans geva ongar reglur um samsýningar fyri arbeiði v.m. til teir, sum eru í nevnd. Heldur ikki eru reglur um býti av einum møguligum úrsliti. Roknskapurin fyri 75 vísur at báðir nevndarlimirnir hava fingið 90.000 kr. tilsamans.

Eingur ongan ognir

Lars nevnir eisini ognarviðurskiftini hjá felagnum. Sambært roknskapin eigur diskotekklubburin ongar ognir. —Tað kann eingin trúgva uppá, tá felagið hevur virkað í meira enn 6 ár. Og hóast felagið ongan ognir eigur, hevur tað goldið viðlikahald av tekniskari útgerð og øðrum. Støðan er eisini tann, at teir báðir fyrrverandi nevndarlimirnir leigaðu høli frá Havnar Klubba, og síðani leigaðu teir hesi høli aftur til diskotekklubban. Útreiðslurnar, sum teir hava lagt út, hava teir so fingið aftur sum inntøku fyri leigu til diskotekklubban. Sama mannagongd er við teknisku útgerðini, sum diskotekklubburin hevur brúkt. Alt hetta eru spurningar, sum verða kannaðir, sigur formaðurin í diskotekklubbanum.

Dans fleiri staðni

—Verður tað figgjarligt fjørlist, fer diskotekklubburin at skipa fyri dansi á fleiri plássum samstundis. Endamálið við hesum er at geva bæði teimum yngru og teimum heldur tilkomnu møguleika at dansa. T.d. kundi vanligt diskotek verið í klubbanum og gamlamannadansur í sjónleikarhúsinum samstundis.

Eisini hevur verið tosað um at seta ein driftsleiðara burturav. Hesin verður løntur eftir arbeiðsinnsatsinum.

Skráseta felagið

Sum er er Diskotekklubburin í Havn ikki skrásettur sum felag. Ein av uppgávunum hjá nýggju nevndini er júst at skráseta felagið, sigur Lars Jespersen.

—Ætlanin er eisini at revidera lógina fyri felagið, so hon samsvarar teimum fyriskipanum, sum eru fyrisettar av fútanum í samsvar við landsstýrið. Tann reglugerðin, sum er galdandi fyri diskotekklubbar, loyvir ikki limatekning við dyrnar. Tí fer diskotekklubburin í Havn at hava eitt ávíst stað, har limatekning kann fara fram, endar Lars Jespersen í samrøðu við Sosialin.

Skipað seg

Nýggja nevndin í diskotekklubbanum í Havn skipaði seg sunnukvøldið:
Lars Jespersen, formaður
Hanna Lisberg, næstformaður
Eiler Johannesen, kassameistari
Snæbjørn í Dali, skrivari
Hans C. Joensen, tekniskur leiðari



Húsmóðir nevndarlimur í diskotekklubbanum:

Eg var heilt og aldeilis ovfarin

Fólk flest hava gott av at dansa

Ein av nýggju nevndarlimunum í Diskotekklubbanum í Havn er Hanna Lisberg. —Eg havi ongantíð moraliserað, og tí hava tey ungu góðtikið meg. Men nógv er at bøta uppá. T.d. haldi eg, at ung undir 14 ár eiga ikki at sleppa full í diskotek. Soleiðis sigur Hanna Lisberg m.a. í samrøðu við Sosialin

Vit spurdu eisini Honnu Lisberg, sum umframt at vera húsmóður og farin um tey 50 eisini er lærarinna og næstformaður í barnanevndini, hvat hon hevur at siga til tað álitið, sum ugdómurin hevur givið henni við at velja hana sum nevndarlim í diskotekklubbanum:

—Eg vil siga tað sentimentalt, at tað var rørandi. Gott nokk komi eg nógv í diskotek. Har eri eg í hvussu er tvær ferðir um vikuna, men tá ein fyrsta er





Hanna Lisberg

lærari og næstformaður í barnanevnd, so heldur ein, at ungdómurin í hasum aldrinum helst vil halda ein uppá avstand. Tí vil eg siga, at eg var heilt og aldeilis ovfarin.

Hanna Lisberg sigur víðari, at hon altíð hevur fingið góða viðferð í diskotekinum. —Nú kundi eg veri omma at nógvum at teimum, sum koma í diskotek, men eg havi lært nógv av teimum ungu. Tey ungu hava heilt og fult góðtikið, at man hevur gingið har, ikki sum tað at ein er gamal, men meira tað, at eg havi ikki gingið og moraliserað og hvørt av sínum. Eg havi góðtikið tey ungu, sum tey hava verið. Men tað, sum eg havi átalað, er, at tað sleppa ov nógv full fólk í diskotekið. Tað ger mær ilt at siggja, hvussu nógv, undir 14 ár, sum eru full.

—Eitt kvøld sum 2. páskakvøld var tað ein syrgilig sjón at siggja ung, sum eru undir 14 ár, ganga full. Tað er hetta, sum eg leggi stóran dent á.

Eg haldi at kontrollarnir mugu vera effektivir. Teir mugu vera so mikið tilkomnir, sum tað stendur á limakortunum, at sjónligt ávirkaður má ikki fáa atgongd, at teir hava skil á hesum. Tað er av týdningi at hava kontrollar, sum ikki sjálvir eru fullir og sum fólk hevur álit á. Eg kann ikki ganga har og koyra ein fullan mann út. Tað ætli eg mær heldur ikki at gera, men eg haldi, at reglugerðin hjá diskotekklubbanum eigur at vera bildin. Í punkt tvey í reglugerðini hjá diskotekklubbanum stendur, at sjónligt ávirkaður eigur ikki at sleppa í diskotekklubban. Hvussu hetta skal gerast veit eg ikki, men er persónur sjónligt ávirkaður, sum t.d. sum herfyri, har eg sá ein ungan drong undir 14 ár sleppa í dans við eini pottafløsku av »Den med Tyren« tá er einki at ivast í.

Hanna Lisberg heldur, at tað hevði verið eitt frálíkt tiltak at hava dans fleiri staðni, har tey ungu dansa og hoyra popp og hini annan tónleik.

—Eg haldi eisini, at vit eiga at leggja stóran dent á, at sleppast kann undan at kíla so nógv fólk saman í eitt rúm, har tað er heitt og trongt, og har fólk gerast agressiv. Tað kann henda, at fólk ikki í fystani dáma so væl at fara í tvinni hús, men eg rokni við, at hetta verður góðtikið so við og við. Hanna Lisberg heldur, at tað hevur týdning fyri býin sum heild, at vit fáa betri umstøður til at dansa. —Tað er ein týðandi táttur at fólk í sini fritíð kunnu slappa av við at dansa og hoyra tónleik. —Eg haldi, at fólk flest hava avgjørt gott av at dansa, sigur næstformaðurin í Diskotekklubbanum í Havn, Hanna Lisberg.